# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Dómarasemjan kostar 300.000 krónur



*Føroysku fótbóltsdómararnir fáa lønarhækkan, men teir verða noyddir at gjalda skatt av samsýningini*

**Tað stóð heilt nógv á, men at enda funnu FSF og føroysku fótbóltsdómararnir ein fíggjarligan leist, sum samsýningarnar nú verða lætnar eftir. Formaðurin í Dómarafelagnum sigur, at einki er í søgunum um, at dómararnir hóttu við verkfalli um vikuskiftið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Knúturin í hesum kom, tá Fíggjarmálaráðið í seinastu tingsetu legði fram uppskot um, hvat kundi loyvast av skattafrælsi til eitt nú fótbóltsdómarar og –venjarar.

Á pappírinum segði gamla lógin, at dómarar kundu forvinna upp til 2.000 kr. um árið, uttan at skattur skuldi rindast av hesum. Talan er um upphædd, sum ikki hevur verið dagførd í heilt nógv ár, og veruleikin hevur helst verið, at dómarasamsýningin í mest sum øllum førum er komin óskattað til móttakaran. Ein praksis, sum eisini varð mest sum legaliserað, tá stjórin á Toll- og Skattstovuni staðfesti, at har høvdu tey ongar sum helst ætlanir um at grava ígjøgnum ítróttin við skattamálum.

### Løggávan bert eitt eiti

Hinvegin hava partarnir vita, at talan hevur verið um at kalla lógloysi á økinum, og tí hevur verið arbeitt við nýggjum leisti. Hesin varð lagdur fyri tingið í vetur, og har varð staðfest, at nýggja markið var 15.000 kr. um árið. Forvunnu dómarar meira enn hetta, skuldi øll inntøkan skattast.

Og tað er sum so eisini her, at trupulleikin hevur ligið. Við tað at samsýningin nú skal rindast yvir skattaskipanina – samstundis sum tað hjá øllum Formula-dómarum er greitt, at inntøkan fer upp um tær 15.000 kr. – vildu hesir upplivað eina munandi lønarminking. Eisini hóast hendan sum so stóðst av, at skattalógin í fleiri ár hevur verið brotin. Snøgt sagt, so hevur gamla løggávan bert verið eitt eiti í so máta.

### Eingin verkfallshóttan

Samstundis hevur FSF nú yvirtikið alla samsýning av fremstu fótbóltsdómarunum, og tað bar við sær, at samráðingar máttu til millum FSF og dómararnar.

Tær samráðingarnar gingu leingi sera tungt. Leygarmorgunin hoyrdist enntá, at dómararnir hóttu við verkfalli, men somikið illa til stóð tað ongan tíð sambært Dagfinni Olsen, formanni í dómarafelagnum.

- Okkara boð hava verið, at vit undir øllum umstøðum fóru út at døma. Og Dómarafelagið hevur givið til kennar, at vit als ikki vildu stuðla einum verkfalli, sigur hann.

### Feløgini gjalda

Og tá semjan so eisini varð góðkend, varð alt hetta tosið so endaliga fyribeint. Nýggja semjan ber við sær, at høvuðsdómarin til ein Formula-dyst nú fær 1.300 kr mótvegis teimum 800 kr., sum áður vóru galdandi. Samlaði kostnaðurin av dómarabólkinum er nú 4.100 kr., og tað er ein øking upp á 1.700 kr. fyri hvønn dystin. Fyri 1. deild er økingin 600 kr. fyri dystin, og tá báðar deildirnar til samans fevna um 135 dystir, veksa upphæddirnar heilt skjótt. Somikið skjótt, at talan í dag er um góðar 300.000 kr., sum føroysku feløgini so ella so mugu rinda meira. Sum skilst, so er upp á tal, at FSF møguliga átekur sær part av kostnaðinum, men hvussu víkir og vendir, so er felagsskapurin ognhjá føroysku feløgunum, so onkursvegna verða tað í seinasta enda hesi, sum mugu bera kostnaðin.

## Sosialurin og Fremad Amager í samstarvi

**Sosialurin hevur gjørt avtalu við danska Fremad Amager um, at føroya fremsta blað eisini verður sonevndur media-partnari hjá Fremad Amager**

SAMSTARV
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Ítrótturin hevur í drúgt áramál havt sítt rásarúm her á blaðnum, og í hesum sambandi hevur umrøða av føroyskum fótbóltsútisetum eisini verið ein náttúrligur partur av okkara arbeiði. Við føroysku yvirtøkuni av Fremad Amager verður tann parturin ikki minni spennandi, og tí vóna vit eisini, at nýggja avtalan verður lesarum okkara at gagni.

Hóast virkisøkini hjá Sosialinum og Fremad Amager eru ymisk, so er møguleiki fyri samstarvi innan fleiri øki, og báðar fyritøkurnar síggja fleiri áhugaverdar møguleikar í avtaluni, sum nú er gjørd.

## Rani og John hava fult stigatal

**Í 2. umfari í FM í talvi í Klaksvík vóru tað serliga veteranarnir, sum stóðu seg væl**

FM Í TALVI
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eftir tvey tey fyrstu umførini í FM í talvi fyri einstaklingar, sum í hesum døgum er í Klaksvík, eru tað bara tveir telvarar, ið hava tvey stig ella fult stigatal.

Tað eru IM'arin John Rødgaard og lokali veteranurin Rani Nolsøe. John vann í gjár við hvíta fólkinum ímóti Andreasi Andreasen, og Rani vann við hvíta fólkinum á Finnbirni Vang.

Ein annar veteranur, Torkil Nilesen, vann við svarta fólkinum ímóti Olafi Berg, sum í liðkappingini í vetur telvaði við felagnum hjá Torkili, Sandavágs Talvfelag. Hini bæði talvini endaðu við remis. Tey vóru Terji Petersen-Martin Poulsen og Sjúrður Thorsteinsson-Ólavur Simonsen.

### Tvey umfør í dag

Støðan eftir tvey umfør: Rani Nolsøe og IM John Rødgaard 2,0 stig, Martin Poulsen 1,5 stig, Torkil Nielsen, Olag Berg og Sjúrður Thorsteinsson 1,0 stig, Terji Petersen, Finnbjørn Vang og Ólavur Simonsen 0,5 stig og Andreas Andreasen 0 stig.

Tvey umfør eru á skránni í dag. Fyrra umfarið var klokkan 10. Tá var skráin hendan: Finnbjørn Vang-Terji Petersen, Ólavur Simonsen-Rani Nolsøe, Torkil Nielsen-Sjúrður Thorsteinsson, Andreas Andreasen-Olaf Berg og Martin Poulsen-IM John Rødgaard.

4. umfar var klokkan 16 í dag.

Kappingin er í Skúlanum við Ósánna í Klaksvík, og hon heldur fram um páskirnar. Seinasta umfar verður leygardagin, og tá verður eisini greitt, hvør kann kall seg føroyameistara í talvi 2007.